# Spurnarblað

# um

# umsiting av studningi til verkætlanir

**Mai 2007**

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 postur@lg.fo
www.LG.fo

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR ... 3**

**2 LÓGARSMÍÐ ... 4**

**3 UMSITING ... 7**

3.1 UM AT KUNNA STUDNINGSMÓTTAKARAR ... 7

*3.1.1 Lýsing ... 7*

*3.1.2 Kunningartilfar ... 7*

3.2 UMSÓKN ... 7

3.3 KRØV TIL FÍGGJAR- OG VIRKSEMISÆTLAN ... 8

3.4 REGLUR FYRI MÁLSVIÐGERÐ ... 9

3.5 JÁTTANARSKRIV ... 9

3.6 VIÐTØKUR ... 10

3.7 ROKNSKAPARLIG SKJALPRÓGV UNDAN ÚTGJALDI ... 10

3.8 ROKNSKAPARREGLUR ... 11

3.9 GRANNSKOÐAN ... 11

**4 EFTIRLIT ... 12**

**5 UMSJÓN ... 13**

**6 EFTIRMETING ... 14**

# 1 Inngangur

Seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar m.a. víst á, at á flestu málsøkjum eru studningslóggáva og studningsumsiting ikki nøktandi. Nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlóg. Er talan um serstaka studningslóggávu, er hon ofta hvørki nóg greið ella nóg fullfíggjað. Sjáldan er endamálið nóg væl lýst, og ofta er ikki heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð, útgjald, roknskap, grannskoðan o.a.

Við játtan á fíggjarlóg heimilar Løgtingið landsstýrismanni at rinda studning til ávís endamál. Umsitingin skal tryggja, at peningurin verður nýttur á ein sparnan og virknan hátt, og at úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanini.

Tí má eitt greitt endamál vera við studninginum, og virksemið, studningurin verður veittur til, skal verða skrásett, so til ber at meta um, hvørt úrslitið svarar til endamálið og fyritreytirnar fyri játtanini.

Er talan um varandi studningsskipan, sum vendir sær til breiðan umsøkjaraskara, hevur Landsgrannskoðanin mælt til at gera serstaka studningslóg/-kunngerð. Lóggávan skal vera við til at tryggja, at sum mest fæst burturúr landsins peningi, og at borgarar verða viðgjørdir eins.

Vit hava fleiri ferðir í frágreiðingum okkara til løgtingsgrannskoðararnar víst á dømi, hvussu ásetingar kunnu verða tiknar við í eina studningslóg/-kunngerð. Hesi dømi um lógarsmíð stava frá einum áliti “Forvaltning af tilskud”, sum ein arbeiðsbólkur undir danska Fíggjarmálaráðnum gjørdi í 1996. Á s. 46-72 í álitinum er ein myndil, ið er ætlaður at verða nýttur til at standardisera og effektivisera:

a) Lógarsmíð
b) Umsiting
c) Eftirlit
d) Umsjón
e) Eftirmeting

Álitið varð gjølla viðgjørt á einum skeiði “Umsiting av studningsjáttanum o.a.”, sum Landsgrannskoðanin skipaði fyri á Viðareiði 3. – 5. september 2001.

Við støði í hesum áliti hava vit sett upp nøkur spurnarbløð, ið kunnu verða nýtt til innanhýsis arbeiðspappír/standardskema í sambandi við grannskoðan av studningsjáttanum. Tey kunnu verða send stovni at fylla út undan einari grannskoðanarvitjan.

Spurnarbløðini kunnu eisini verða latin stovni ella aðalráð til íblástur, og soleiðis verða við til at menna umsitingina av studningsjáttanum.

# 2 Lógarsmíð

Hjálagt er spurnarblað A, ið kann verða nýtt til at kanna eftir, í hvønn mun ásetingarnar í myndlinum um **lógarsmíð** eru við í studningslóg/–kunngerð ella í einum lógaruppskoti.

Hjálagt er eisini spurnarblað B, ið kann verða nýtt, er talan um studningsskipan, har neyvari reglur ikki eru ásettar í serstakari studningslóg/-kunngerð. Spurnarblaðið kann verða nýtt til at kanna, í hvønn mun aðalráðið á annan hátt hevur ásett reglur mótvegis triðjamanni. Fleiri aðalráð hava t.d. sett reglur í lýsingum í bløðunum, á heimasíðum, í umsóknarbløðum, í roknskaparreglugerðum, í játtanarskrivum o.t.

| A | **A. Spurningar um lógarsmíð, har neyvari reglur eru ella skulu verða ásettar í serstakari studningslóg/-kunngerð ella í lógaruppskoti.** | Ja | Nei | **Er nakað ásett:**<br>***hvør*** hevur ásett,<br>***nær*** er tað gjørt,<br>***hvat*** er ásett, og<br>***hvar/hvussu*** er tað kunngjørt<br>(vísa til avrit av ásetingum) |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Í lógini er endamálið við at veita studning ásett so greitt og neyvt sum til ber. | | | |
| 2 | Í viðmerkingum til lógaruppskotið er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. | | | |
| 3 | Í lógini ella í kunngerð er lýst/avmarkað, hvør kann fáa studning. | | | |
| 4 | Í lógini, í viðmerkingum ella í kunngerð eru reglur fyri, hvussu studningurin verður roknaður út; ella stendur í lógini, at studningurin verður ásettur á árligari fíggjarlóg. | | | |
| 5 | Í lógini ella í kunngerð eru reglur fyri, hvussu og nær studningur kann verða goldin út. | | | |
| 6 | Heimild er í lógini at seta reglur fyri málsviðgerð, t.d. um:<br>1. at viðgera og góðkenna umsóknir | | | |
| 7 | 2. skjalprógv frá umsøkjara | | | |
| 8 | 3. játtanarskriv | | | |
| 9 | 4. fortreytir fyri tí virksemi, studningurin kann verða brúktur til | | | |
| 10 | Heimild í lógini at krevja, at viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.t. skulu lúka ávís minstukrøv ella verða at góðkenna sum treyt fyri at fáa studning. | | | |
| 11 | Heimild er í lógini at seta treytir og reglur fyri:<br>5. fíggjarætlan, virksemisætlan | | | |
| 12 | 6. eftirliti við játtanum | | | |
| 13 | 7. roknskapi, virksemisroknskapi | | | |
| 14 | 8. grannskoðan | | | |
| 15 | 9. umsjón við grunnum, feløgum o.ø., ið umsita studningsjáttan | | | |
| 16 | Í lógini er ásett, at studningsmóttakari hevur skyldu til at upplýsa, hvørt treytirnar fyri studningi eru loknar, og at studningsveitari hevur rætt til at kunna seg um tað á staðnum. | | | |
| 17 | Í lógini er ásett, at ein tilsøgn um studning fellur burtur, ella at studningur verður at rinda aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar hann ikki at fullføra eina ætlan fyri ásettu tíðina. | | | |
| 18 | Møguligar revsireglur eru ásettar í lógini. | | | |

| B | **B. Spurningar sum kunnu verða settir, tá talan er um eina studningsskipan, har neyvari reglur <u>ikki</u> eru ásettar í serstakari studningslóg/-kunngerð:** | Ja | Nei | **Er nakað ásett:** ***hvør*** hevur ásett**,** ***nær*** er tað gjørt, ***hvat*** er ásett, og ***hvar/hvussu*** er tað kunngjørt (vísa til avrit av ásetingum) |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Er endamálið við at veita studning ásett so greitt og neyvt sum til ber. | | | |
| 2 | Er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. | | | |
| 3 | Er lýst/avmarkað, hvør kann fáa studning. | | | |
| 4 | Eru reglur fyri, hvussu studningur verður roknaður út. | | | |
| 5 | Eru reglur fyri, hvussu og nær studningur kann verða goldin út. | | | |
| | Eru reglur ásettar fyri málsviðgerð, t.d. um: | | | |
| 6 | 10. at viðgera og góðkenna umsóknir | | | |
| 7 | 11. skjalprógv frá umsøkjara | | | |
| 8 | 12. játtanarskriv | | | |
| 9 | 13. fortreytir fyri tí virksemi, studningurin kann verða brúktur til | | | |
| 10 | Er ásett, at viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.t. skulu lúka ávís minstukrøv ella verða at góðkenna, sum treyt fyri at fáa studning. | | | |
| | Eru neyvari treytir og reglur ásettar fyri: | | | |
| 11 | 14. fíggjarætlan, virksemisætlan | | | |
| 12 | 15. eftirliti við játtanum | | | |
| 13 | 16. roknskapi, virksemisroknskapi | | | |
| 14 | 17. grannskoðan | | | |
| 15 | 18. umsjón við grunnum, feløgum o.ø., ið umsita studningsjáttan | | | |
| 16 | Er ásett, at studningsmóttakari hevur skyldu at til at upplýsa, hvørt treytirnar fyri studninginum eru loknar, og at studningsveitari hevur rætt til at kunna seg um tað á staðnum. | | | |
| 17 | Er ásett, at ein tilsøgn um studning fellur burtur, ella at studningurin verður at rinda aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar hann ikki at fullføra eina ætlan fyri ásettu tíðina. | | | |
| 18 | Eru møguligar revsireglur ásettar. | | | |

# 3 Umsiting

## 3.1 Um at kunna studningsmóttakarar

### *3.1.1 Lýsing*

| **Í lýsingini stendur:** | **J** | **N** | **I** | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Hvat aðalráð ella hvør stovnur umsitur studningin | | | | |
| Stutt lýsing av endamálinum við studninginum | | | | |
| Hvussu nógvur peningur er settur av til studningin | | | | |
| Hvør kann fáa studning | | | | |
| Hvar umsóknarbløð og aðrar upplýsingar (vegleiðingar) kunnu fáast | | | | |
| Umsóknarfreist | | | | |

### *3.1.2 Kunningartilfar*

| **Í kunningartilfarinum er greinað:** | **J** | **N** | **I** | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Endamálið við studningsskipanini | | | | |
| Hvør kann søkja um studning | | | | |
| Krøv fyri at fáa studning, herímillum hvørji útreiðslusløg verða endurgoldin | | | | |
| Hvørjar verkætlanir kunnu fáa studning | | | | |
| Hvussu og hvar søkt verður um studning | | | | |
| Hvørji krøv verða sett til umsókn, fíggjarætlan, roknskap og frágreiðingar (oyðublað og vegleiðing verður lagt við) | | | | |

## 3.2 Umsókn

| **Í umsóknarblaðnum verður biðið um:** | **J** | **N** | **I** | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Almennar upplýsingar, so sum navn á umsøkjara, bústað, telefonnummar, bankasamband og kontunummar | | | | |
| Frágreiðing um, hvør juridiskt "umboðar" stovnin/felagið | | | | |
| Lýsing av verkætlanini | | | | |
| Útgreinaða fíggjarætlan fyri verkætlanina | | | | |
| Tíðarætlan, herímillum nær útgjøldini skulu fella | | | | |
| Grundgeving fyri, hví søkt verður um studningin | | | | |
| Møguligar virkisupplýsingar, herímillum roknskaparupplýsingar | | | | |
| Undirskrift hjá umsøkjara og frágreiðing um, hvør er kontaktpersónur | | | | |

## 3.3 Krøv til fíggjar- og virksemisætlan

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| **Studning til serstakar verkætlanir** | | | | |
| Har landið veitir studning til serstaka verkætlan:<br>- Eru krøv um, at studningsumsóknin byggir á fíggjarætlan fyri verkætlanina?<br>- Fevnir umsóknarblaðið um krøvini til fíggjarætlan?<br>- Er vegleiðing fyri, hvussu fíggjarætlanin skal verða sett upp?<br>- *Løn (tímatal x tímasats), íroknað verkætlanarleiðslu*<br>- *Ferðaútreiðslur*<br>- *Útgerð og tilfar*<br>- *Tænastur*<br>- *Edv-útreiðslur*<br>- *Aðrar útreiðslur, ið serliga knýta seg at verkætlanarslagnum*<br>- *Fígging av verkætlanini, herímillum onnur fígging* | | | | |
| Er neyv lýsing av verkætlanini løgd við fíggjarætlanini?<br>- um verkætlanini fevnir um fleiri ár: er virksemið og fíggingin býtt upp í stig? | | | | |
| Fyri størri verkætlanir:<br>- Er verkætlanarlýsing og fíggjarætlan váttað av grannskoðara?<br>Fyri minni verkætlanir:<br>- Er verkætlanarlýsing og fíggjarætlan váttað av t.d. nevndarformanni, juridiskum ábyrgdarfólki e.l.? | | | | |
| Tá verkætlan er liðug: er ein grannskoðaður roknskapur í "málinum" ? | | | | |
| Studningsfíggjað virksemi skal roknskaparliga altíð vera skilt frá øðrum virksemi hjá studningsmóttakara | | | | |

## 3.4 Reglur fyri málsviðgerð

| **Eru reglur og mannagongdir ásettar fyri, hvussu málsviðgerðin skal fara fram:** | **J** | **N** | **I** | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| - Innanhýsis ábyrgdarbýti fyri, hvør játtar studning (knýtt at roknskaparreglugerðini)<br>- Tíðarfreistir, nær umsóknir skulu verða latnar inn<br>- Hvørjari raðfylgju, umsóknir verða viðgjørdar<br>- Tíðarfreistir, nær umsóknir skulu verða liðugt viðgjørdar<br>- Krøv til journalviðurskifti<br>- Ummæli frá øðrum myndugleika<br>- Ásett krøv um góðskuna av umsóknartilfarinum, t.d. á einum stiga frá 1-10, har neyðugt er at hava eitt ávíst stigatal, fyri at ein umsókn/verkætlan kann verða góðkend.<br>- Kekklistar gjørdir fyri at: tryggja at treytirnar fyri at fáa studning eru loknar, at meta um, hvørt umsøkjari megnar at fullføra verkætlanina og at fullføra hana fyri ásettu tíðina<br>- Møgulig "ovara/niðara" mark fyri, hvussu stórur studningin kann vera, og um heimildina fyri tilsøgn<br>- At krøvini í fyrisitingarlógini verða fylgd um at grundgeva fyri noktandi svari<br>- Nær verkætlan byrjar og endar<br>- Ásetingar fyri hvørja verkætlan sær<br>- Krøv fyri at fremja verkætlan, t.d. roknskaparligar frágreiðingar og frágreiðingar um gongdina í verkætlanum, herímillum um hvussu ofta frágreiðing skal verða latin. Møgulig krøv um grannskoðarátekning<br>- Krøv um, at studningsveitari skal verða kunnaður, verða fortreytir fyri at fullføra verkætlan broyttar | | | | |
| Reglur og mannagongdir tryggja, at allir umsøkjarar fáa somu viðferð | | | | |

## 3.5 Játtanarskriv

| | **J** | **N** | **I** | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Játtanarskriv verður sent studningsmóttakara | | | | |
| Játtanarskriv verður sent tí, sum juridiskt "umboðar" stovn/virki | | | | |
| Í játtanarskrivinum verður skilað til:<br>- materiellu og fíggjarligu heimildini fyri "játtanini"<br>- upphæddina, sum er játtað,<br>- hvat virksemi studningur verður veittur til<br>- nær studningur verður goldin út, møguliga í ratum<br>- møgulig krøv til roknskaparlig skjalprógv, áðrenn goldið kann verða út<br>- hvørja peningastovnskontu studningin verður fluttur á<br>- treytir og fortreytir fyri stuðlinum, herímillum krøv um, at studningsmóttakari skal boða frá, stinga broytingar seg upp í verkætlanini, krøv til roknskapar- og verkætlanarfrágreiðingar og krøv til grannskoðan | | | | |
| Vegleiðing um studningstreytir verður send studningsmóttakara saman við játtanarskrivinum | | | | |

## 3.6 Viðtøkur

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| **Studning > 50% av rakstrarútreiðslunum** | | | | |
| Aðalráðini skulu tryggja sær:<br>- at í studningslóggávuni verða krøv sett til viðtøkur hjá stovnum/virkjum, ið skulu hava studning, ella<br>- at aðalráðini skulu góðkenna viðtøkur hjá stovnum/virkjum, ið fáa studning | | | | |
| Í viðtøkunum skal verða ásett:<br>- Navn og heimstaður hjá sjálvsognarstovninum<br>- hvussu ognir verða umsitnar<br>- endamál hjá stovninum<br>- yvirskipaða leiðsla á stovninum<br>- hvør umboðar stovnin juridiskt<br>- hvussu nevnd verður vald, sett saman, og hvussu leingi hon situr<br>- val av nevndarformanni<br>- krøv til viðtøkuføri hjá nevndini<br>- neyv lýsing av ábyrgdar- og heimildarbýti hjá nevndini<br>- at sjálvsognarstovnur heftir við síni ogn eftir vanligum rættarreglum<br>- mannagongdir fyri, hvussu broytingar í viðtøkum fara fram<br>- reglur fyri, hvussu eginpeningur skal verða nýttur, verður stovnurin tikin av | | | | |
| | | | | |
| **Studning < 50% av rakstrarútreiðslunum** | | | | |
| Er rakstrarstudningin < 50% skulu aðalráðini tryggja sær, at stovnurin hevur viðtøkur, og at tær stýra virkseminum hjá stovninum á "týðandi økjum" | | | | |

## 3.7 Roknskaparlig skjalprógv undan útgjaldi

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Rakstrarstudningin til t.d. sjálvsognarstovnar verður goldin út, tá hann skal verða brúktur:<br>- sjálvvirkandi<br>- á eina peningastovns- ella girukontu | | | | |
| Útgjald av stuðli til serlig endamál/verkætlanir byggir á nýtslu, sum studningsmóttakari hevur skjalprógvað | | | | |
| Tá goldið verður út so hvørt, skulu roknskaparlig skjalprógv eisini verða send so hvørt | | | | |
| Verður forskot goldið út við støði í fíggjarætlan fyri verkætlan, verður studningsmóttakari kunnaður um, at forskotið/útgjaldið kann verða javnað, tá roknskapurin fyri verkætlanina er lagdur fram | | | | |
| Studningurin tikin við sum inntøka í roknskapinum hjá studningsmóttakara | | | | |
| Útgjøld av stórum studningsupphæddum byggja á verkætlanarroknskapir, sum eru býttir upp í roknskapir fyri styttri tíðarskeið enn eitt ár | | | | |

## 3.8 Roknskaparreglur

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| **Studning til serstakar verkætlanir** | | | | |
| Krøv til roknskapir fyri verkætlanir eru:<br>- at roknskapurin er lagdur fram sambært góðum roknskaparsiði (víst verður til roknskaparlógina)<br>- at yvirlit skal vera yvir inntøkur og útreiðslur hjá verkætlanini, umframt fíggjarætlan fyri verkætlanina<br>- at frágreiðing er um frávik millum fíggjarætlan og roknskap<br>- at roknskapurin er skrivaður undir av verkætlanarleiðaranum og møguliga áteknaður av grannskoðara (Í DK fyri studning > 100.000 kr.)<br>- at skjalprógv eru viðløgd<br>- at mvg-roknskapur er viðlagdur | | | | |

## 3.9 Grannskoðan

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Krøv um grannskoðan eru ásett í studningslóggávu | | | | |
| Neyvari reglur um grannskoðan eru ásettar í kunngerð | | | | |
| Ásetingar á grannskoðanarøkinum skulu verða lagaðar til ta studningsskipan, sum grannskoðanarinstruksurin fevnir um<br>- studningsveitari hevur gjørt sær greitt, hvørjar upplýsingar hann ynskir at fáa frá grannskoðaranum<br>- tað er ásett, hvussu grannskoðanin skal verða framd, og hvussu úrslitið av grannskoðanini skal verða fráboðað | | | | |
| Uppskot til ásetingar á grannskoðanarøkinum skulu frammanundan verða fráboðað roknskapargrannskoðanini | | | | |
| Har krøv ikki eru um at gera grannskoðanarinstruks, skal verða ásett í játtanarskrivinum, hvussu grannskoðanin skal verða framd, og hvørjar frágreiðingar skulu verða gjørdar | | | | |

# 4 Eftirlit

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Aðalráðið hevur í studningslóggávu tryggjað sær neyðuga heimild til at áseta reglur og mannagongdir fyri eftirliti og fyri umsjón | | | | |
| Krøv eftirlit, sum ein eksternur myndugleiki skal fremja, skulu verða tey somu, sum hevði aðalráðið sjálvt eftirlit við studningsskipanini | | | | |
| Eru eftirlitsuppgávur lagdar til eksternan myndugleika, skal ábyrgdar- og heimildarbýti verða ásett í studningslóggávu | | | | |
| Aðalráðið hevur ásett, hvussu studningsmóttakari skal fráboða til eksterna myndugleikan (roknskapir, váttanir, fíggjarætlan, grannskoðanarfrágreiðingar o.l.) og hvussu eksterni myndugleikin skal viðgera fráoðanirnar | | | | |

| **Studning til serstakar verkætlanir** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Eftirlit við stuðli til verkætlanir o.t. fevnir um at gjøgnumganga og góðkenna:<br>- fíggjarætlan fyri verkætlan<br>- áseting av, hvørji mál skulu verða nýtt fyri at eftirmeta verkætlan<br>- kekklistar fyri at meta, um studningstreytir eru loknar<br>- roknskaparligt skjalprógv fyri útgjøldum<br>- krøv um og til frágreiðingar um roknskap og verkætlan, herímillum møguligar ávegisfrágreiðingar<br>- krøv um grannskoðanarváttan<br>- krøv til studningsmóttakara um at kunna studningsveitara, verða fortreytirnar fyri verkætlanini broyttar<br>- krøv um at endalig frágreiðing um verkætlanargongd verður løgd saman við endaligum roknskapi fyri verkætlanini. Møgulig grannskoðanarváttan.<br>- gjøgnumgongd av grannskoðaðum roknskapum | | | | |

# 5 Umsjón

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Har studningsskipanir eru latnar øðrum myndugleikum at umsita, fylgir aðalráðið við, at ásetingar fyri, hvussu studningsskipan skal verða umsitin, verða fylgdar | | | | |
| Aðalráðið skal hava ásett reglur og mannagongdir, sum tryggja, at eksterni myndugleikin kann útvega sær tær upplýsingar, sum eru neyðugar | | | | |
| Aðalráðið hevur sett neyðugar mannagongdir fyri fráboðanir frá studnings-móttakara | | | | |
| Aðalráðið/studningsveitarin hevur sett krøv til eksternu umsitingina:<br>- hvussu fíggjarætlanir verða viðgjørdar<br>- um frágreiðingar<br>- um gjøgnumgongd av grannskoðaðum roknskapi og ársfrá-greiðing | | | | |
| Studningsveitarin setur krøv til, hvussu studningsmóttakarin umsitur studning-in. Aðalráðið/studningsveitarin hevur ásett reglur og mannagongdir fyri, nær og undir hvørjum umstøðum ein eftirlitsmyndugleiki fráboða studningsveitaranum | | | | |
| Har aðalráðið sjálvt hevur eftirlitið við studningsskipanini, er "umsjónin" ein árlig eftirmetan av teimum royndum, sum sum stava frá gjøgnumgongd av grannskoðaðu roknskapunum, grannskoðanarfrágreiðingunum og ársfrá-greiðingunum | | | | |
| Aðalráðið eftirmetir við jøvnum millumbili um umsitingarligu reglurnar eru hóskandi | | | | |

# 6 Eftirmeting

| | J | N | I | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|
| Eftirmetingin hjá aðalráðnum er ein staðfesting av:<br>- um endamálið við studningsskipanini er rokkið<br>- um reglur og mannagongdir fyri umsiting, eftirliti og umsjón virka eftir ætlan<br>- um tørvur er á broytingum | | | | |
| Endar eftirmetingin við einari skrivligari frágreiðing | | | | |
| Væleydnað eftirmeting krevur:<br>- at ein ætlan er løgd fyri eina eftirmeting, áðrenn studningsskipanin verður sett í verk<br>- at endamálsorðingin fyri studningsskipanini er neyv<br>- at ásetingar eru gjørdar fyri, hvat skal koma burturúr, | | | | |
| Aðalráðið hevur sett tøl á tey mál, sum studningsskipanin skal verða við til at tryggja | | | | |
| Verður studningur veittur við heimild í fíggjarlóg, skal verða ásett í viðmerkingunum til fíggjarlógina, hvat endamálið við studningsskipanini er, og nær málið kann sigast at verða rokkið | | | | |
| Er talan at stuðla eina røð av líkum verkætlanum, verður studningsskipanin eftirmett, tá "røðin" er liðug | | | | |
| Aðalráðið eftirmetir studningsskipanina | | | | |
| Óheftur "stovnur" eftirmetir studningsskipanina | | | | |
| Eftirmeting av studningsskipan, har studningur verður veittur til rakstur av sjálvsognarstovni, fevnir um:<br>- hvørt endamál og ásetingar fyri, hvat koma skal burturúr, eru rokkin<br>- hvørt ásett mál eru rokkin, kvalitativt og kvantitativt<br>- hvørt yvirlit eru gjørd við hagfrøðiligum og fíggjarligum lyklatølum<br>- hvørt studningsmóttakari hevur keypt vørur og tænastu á bíligasta hátt (sparsemi)<br>- hvørt ásetingarnar í lógini, sum studningsskipanin byggir á, hava virkað eftir ætlan<br>- hvørt tær reglur og mannagongdir, sum eru ásettar fyri umsitingina av stuðlinum, hava virkað eftir ætlan, og hvussu tær eru útintar<br>- Hvørjar royndir kunnu fáast frá tí eftirliti við studnings-skipanini , sum verður framt so hvørt, og frá eftirliti, sum fer fram eftir at studningurin er veittur<br>- Hvørjar royndir kunnu fáast frá tí umsjón aðalráðið fremur | | | | |